## Claus skal venja strandingar

Jakob Jónson, sum var venjari hjá besta mansliðnum hjá StÍF síðsta kappingarár, er ikki longur knýttur at felagnum. Hann er blivin venjari hjá besta kvinnuliðnum í Neistanum, og tí var neyðugt hjá StÍF at finna ein nýggjan venjara. Og hetta tók teimum ikki langa tíð. Stutt eftir farna kappingarár bleiv kunngjørt, at fyrrverandi neistavenjarin, Claus Rasmussen, og StÍF vóru blivin samd um eina avtalu, sum ger, at Claus skal venja standingar komandi kappingarár.



## Nýggjur dani í StÍF

Ávísar broytingar eru hendar í hópinum hjá StÍF í mun til síðsta kappingarár. Spælandi venjarin, Jakob Jónson, er ikki í felagnum longur, tí hann er farin at venja kvinnurnar hjá Neistanum. Heldur ikki íslendski stórskjúttin, Finnur Hansson, er at finna í StÍF longur. Hann er farin til meistararnar úr Kyndli, og m.a. av hesi orsøk hava strandingar fingið ein nýggjan dana afturat hópinum. Talan er um 31 ára gamla Danny Syhler, sum m.a. skal styrkja um bakketuna hjá strandingum.

# Strandingar miða høgt

**Strandingar ætla sær at vera við heilt frammi í oddinum í ár, og sjálvandi ætla teir sær eisini allan vegin í steypakappingini. Breiddin á liðnum kann tó gerast ein trupulleiki. – Um hópurin ikki gerst breiðari, enn hann er júst nú, so fara vit ikki at tola nógvar skaðar, sigur stórskjúttin, Sveinur Justinussen**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*- Fleiri av teimum, sum vóru við á liðnum í fjør, hava slett ikki vant enn í ár, og tí kann hópurin í løtuni tykjast vera heldur tunnur, sigur stórskjúttin hjá strandingum, Sveinur Justinussen.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Besta mansliðið hjá strandingum man helst teljast ímillum eitt av mest sigursvandu liðunum í manshondbólti seinnu árini. Hetta er tó als ikki tí, at liðið altíð hevur klárað seg so væl í landskappingini, tí meistaraheitini eru ikki nógv í tali. Hinvegin er StÍF steypaliðið yvir øllum hinum liðunum, og teir hava mest sum ognað sær monopol upp á sigurin í steypafinaluni.

Farna kappingarár var heldur einki undantak í so máta fyri menninar hjá StÍF. Sum ikki einaferð tryggjaðu teir sær sigurin í steypakappingini longu í februar mánaði, og eftir hetta tóktust teir kanska dovna eitt sindur í landskappingini. Á síðsta leikdegi høvdu teir tó møguleikan at tryggja sær bronsuheiðursmerkini, tá teir tóku ímóti KÍF á heimavølli, men eitt tap gjørdi í staðin, at tað vóru kollfirðingar, sum fóru avstað við triðja plássinum.

Nú stendur eitt nýtt kappingarár so fyri framman, og enn einaferð verður væntað nógv av liðnum hjá StÍF. Tað hava tó verið fleiri útskiftingar í hópinum, og liðið hevur m.a. mist bæði toppskjúttan og spælandi venjaran frá síðsta kappingarári. Í staðin fyri Jakob Jónson hevur felagið fingið fyrrverandi neistavenjaran, Claus Rasmussen, at standa á odda fyri liðnum, og tí verður tað hann, sum skal føra liðið upp í oddin.

Sosialurin hevur tikið eitt prát við stórskjúttan hjá strandingum, Svein Justinussen, um vónirnar hjá liðnum til komandi kappingina, sum fer í gongd um tríggjar dagar.

### Tunt við fólki

Í ár stendur ein nýggjur aður við róðri hjá Neistanum. Venjarin frá farna kappingarári, Jakob Jónson, er farin at venja kvinnurnar hjá Neistanum, og tí er tað í staðin Claus Rasmussen, sum nú stendur við stýrisvølin hjá StÍF.

Og spælararnir hjá strandingum tykjast vera væl nøgdir við nýggja venjaran.

- Ja, eg haldi, at menn eru væl nøgdir við Claus sum venjara. Hann hevur sera góðar venjingar, og so haldi eg eisini, at har er nógvur futtur í venjingunum, og hetta dámar mær í øllum førum væl, sigur Sveinur Justinussen.

Sveinur heldur tó, at hópurin tykist vera heldur tunnur til komandi kappingarár, um ikki fleiri spælarar koma til venjing.

- Menn tykjast vera væl fyri til komandi kappingarár, og tað síðsta er við at koma ordiliga upp á pláss. Fleiri av teimum, sum vóru við á liðnum í fjør, hava tó slett ikki vant enn, og tí kann hópurin í løtuni tykjast vera heldur tunnur. Hvørki Mortan, Bent ella Borgar hava vant enn, men vit vóna, at teir vera við í ár allíkavæl, sigur Sveinur.

### Fara eftir greipuni

Strandingar hava tey síðstu nógvu árini verið mest sum einaráðandi í steypakappingini, men Sveinur sigur, at hetta er ikki tað einasta, sum teir ætla at vinna í ár.

- Vit ætla okkum inn á vøllin fyri at vinna hvønn dyst, og tí má málið sjálvandi vera at vinna bæði landskappingina og steypakappingina.

Sveinur ásannar tó, at smali hópurin kann gerast ein trupulleiki.

- Ja, tað er eingin ivi um, at smali hópurin hjá okkum kann gerast ein trupulleiki. Um fleiri spælarar ikki koma afturat hópinum, so fara vit ikki at hava ráð til serliga nógvar skaðar á liðnum, og hetta kann sostatt gerast ein trupulleiki.

Tá vit síðani spurdu Svein, hvørjum liðum hann væntaði sær harðast kapping frá, ivaðist ungi skálamaðurin eitt sindur.

- Eg havi ikki serliga nógv at døma út frá, men hyggja vit til dømis eftir kappingina, sum var í Havn síðsta vikuskiftið, so tykist KÍF at hava eitt rættiliga gott lið. Eg vænti eisini, at bæði Kyndil og Neistin vera væl við í ár, men sum heild vænti eg eina rættiliga javna og spennandi kapping, har øll liðini kunnu taka stig frá øllum, sigur Sveinur.

### Verjan hevur nógv at siga

At enda spurdu vit Svein, hvørjir týdningarmestu eginleikarnir vóru hjá StÍF á vøllinum.

- Verjan hjá okkum hevur altíð verið rættiliga stinn, og hon verður sjálvandi eisini týdningarmikil til komandi kappingarár saman við Marian í málinum. Haraftur-at hevur eitt av eyðkennunum hjá StÍF altíð verið skjóti hondbólturin, men síðstu árini hevur hetta halta eitt sindur. Ætlanin hjá okkum er tó at fáa skjóta spælið fram aftur á liðnum, sigur Sveinur.

- Hinvegin má smali hópurin metast at vera ein av veikleikunum hjá liðnum, tí sum nú er fara vit slett ikki at hava ráð til skaðar, staðfestir Sveinur at enda.

Tað verður spennandi at fylgja við gongdini hjá strandingum komandi kappingarár, og serliga spennandi verður tað at vita, um tað aftur í ár fer a eydnast StÍF at vinna steypakappingina – ella kanska bæði steypakapping og landskapping.